## Fund um samanlegging

Fyrradagin vóru umboð fyri Klaksvíkar býráð og landsstýrið í Svínoy og tosaðu við bygdarráðið har um ætlanina at leggja Klaksvíkar kommunu og Svínoyar kommunu saman. Úr landsstýrinum vóru Jacob Vestergaard, landsstýrismaður, og Hilmar Høgenni, deildarstjóri. Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, og Kristjan Árnason, fulltrúi, vóru eisini í Svínoy í sambandi við ætlanina at byggja eitt eldrasambýli í bygdini.



## Fundast við Bjørn

Í morgin fara feløgini hjá teimum, sum eiga bátar og skip, á fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Bjørn Kalsø, um uppskot hanara um broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap. Broytingarnar hava millum annað til endamáls at forða fyri, at veiðirættindini enda á ov fáum hondum. Tað er greitt, at vinnan tekur ikki undir við øllum broytingunum, men vinnuumboðini vilja tó einki siga undan fundinum við Bjørn Kalsø í morgin.

Jóhan Dahl, nýggjur næstformaður í Sambandsflokkinum:

# Fremsta uppgávan at stuðla formanninum

**Jóhan Dahl vann rættiliga sannførandi atkvøðugreiðsluna á landsfundi Sambandsfloksins um nýggjan næstformann. Eitt tað fyrsta, Jóhan fer í holt við, er at fáa ungdómin virknan aftur í flokkinum, og annars sær suðuroyartingmaðurin tað sum sína fremstu uppgávu, at bakka upp um og stuðla formanni floksins**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Jóhan Dahl, nýggjur næstformaður í Sambandsflokkinum, metir fremstu uppgávurnar vera, at stuðla formanninum – og at kveikja áhugan fyri sambandspolitikki aftur millum tey ungu*

Tað vóru longu undan stríðsvalinum í Sambandsflokkinum fríggjakvøldið ábendingar um, at Jóhan Dahl fór at fáa størri undirtøku enn sitandi næstformaður, Alfred Olsen.

Og hetta vísti seg eisini. 29 atkvøður vóru fyri Jóhan Dahl, meðan 17 fóru til Alfred Olsen.

Jóhan sjálvur hevur annars verið tigandi upp undir hetta stríðsvalið í flokkinum, tí, sum hann sigur, so er ikki so nógv at bera fram í hesum sambandi.

- Spurningurin var kanska meiri, hvat ber til hjá einum tingmanni í samgongu, og um tað ber til at hava ein næstformann, sum hevur meldað seg úr samgonguni, sigur Jóhan Dahl.

Hann hevur áður víst á, at hann bert gjørdi eftir áheitan frá sínum valfelag, og at hann altíð hevur havt eitt gott samstarv við Alfred Olsen – og tað væntar hann framvegis at fara at hava.

Men vit eru hvør sínar »typur«. Eg eri kanska meiri framfýsin, meðan Alfred fer heldur stillisligari fram, so vit hava nokk hvør sín hátt at bera tingini fram, sigur Jóhan Dahl.

### Menna flokkin

Tingmaðurin úr Vági hevur sjálvandi gjørt sær sínar hugsanir um, hvussu hann á besta hátt kann røkja starvið sum næstformaður í flokkinum, og hvørji mál, hann kundi hugsa sær at rokki fyrst.

- Tað er sjálvandi ein avbjóðing alla tíðina at menna flokkin og virka fyri, at flolkkurin varðveitir sína støðu sum størsti flokkur í landinum. Og tað verður eisini neyðugt at líta út um landoddarnar. Vit mugu fáa skapt neyðugar karmar við atliti til útheimin, sigur Jóhan Dahl.

Hann hugsar her serliga um, at fólk yvirhøvur vita alt ov lítið um ES-felagsskapin, og tí verður átrokandi neyðugt at fáa kortlagt, hvat vit kunnu og hvat vit ikki kunnu í sambandi við ES.

-Sambandsflokkinum verður ofta skotið í skógvarnar, at hann er ein afturhaldsflokkur. Men hetta er als ikki so. Sambandsflokkurin er tann flokkur, sum hevur framt flestar yvirtøkur síðani heimastýrislógina í 1948, vísir Jóhan Dahl á.

### Eggja ungdóminum

Eitt annað av hjartamálunum hjá nýggja næstformanninum er, at fáa tey ungu við aftur í Sambandsflokkin. Unga Sambandið hevur ikki verið virkikð í eina tíð, og hetta er nakað, Jóhan Dahl ætlar sær at gera nakað við.

- Tað er neyðugt at halda teimum ungu til eldin og stuðla teimum. Tað er sjálvandi lættari hjá eitt nú Tjóðveldisflokkinum at fáa tey ungu at skilja sín boðskap. Frælsar Føroyar, klára okkum sjálvi og so víðari. Har mugu vit gerast betri at greiða frá, hvat sambandspolitikkurin veruliga inniber og hvat skal til, fyri at landið kann mennast, sigur nýggi næstformaðurin í Sambandsflokkinum.

Ein onnur uppgáva verður, at bakka upp um og stuðla formanninum í flokkinum, og føra virknan sambandspolitikk, og har ætlar Jóhan Dahl, at hansara arbeiði ikki skal liggja eftir.

# Ritan næstan niðursigld



SKIPAFERÐSLA

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Bæði ferðafólk og manning fingu ein skelk seinasta fríggjamorgun, tá Ritan var á veg úr Nólsoy til Havnar.

Norður gjøgnum Nólsoyarfjørð kom Christian í Grótinum grøvandi, og hóast skiprarnir tosaðu saman, gjørdi nótabáturin onga roynd at halda av, so sum hann annars sambært sjóreglunum átti.

Endin var, at Ritan mátti snara runt, og tá vóru skipini so nær hvørjum øðrum, at tað var um reppið, at ikki skaði stóðst av.

Hví skiparin á Christiani í Grótinum valdi ikki at halda av, er ógreitt. Men manningin á Rituni er sannførd um, at støðan var so álvarslig, at snaraði skiparin ikki ferðamannaskipinum runt, hevði tað óivað endað við samanstoyti.